# Ert tú jaligur og kveikjandi starvsfelagi?



Frítíðarskúlin Spírin á Eiði leitar eftir námsfrøðingi ella hjálparfólki, ið er jaligt og kveikjandi fyri arbeiðsumhvørvið, og sum brennur fyri at geva børnum góðar náttúruupplivingar og ein tryggan og mennandi gerandisdag. Á Eiði eru ríkar náttúruperlur, so sum hagi, vatn og fjøra (og fótbóltsvøllur), ið geva alskyns møguleikar fyri børn og vaksin.

Vit vilja, við tykkara hjálp, virka fyri at menna eitt avbjóðandi og læruríkt námsfrøðiligt umhvørvi, kveikja góðan starvsfólkatrivnað, og leggja dent á at geva børnum umsorgan, spæl og læru, mentan og sosialisering.

Tit koma at virka saman við royndum og eldhugaðum starvsfólkum, har leiðslustílurin er lættur, lurtandi, luttakandi og semjusøkjandi. Á Eiði hava vit eitt virkið foreldraráð og áhugaðar politikarar, ið vísa góðan vilja til at menna eitt námsfrøðiligt virksemi. Møguleiki er at arbeiða fulla ella niðursetta tíð. Arbeiðstíðirnar kunnu tillagast, og tíð er til fyrireiking, sparring og supervisjón.

Løn sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Føroya pedagogfelag. Hava tit spurningar, ella ynskja tit at síggja umstøðurnar, eru tit væl komin at ringja til Kristinu T. Larsen, leiðara, á telefon 740410. Vit gleða okkum at fáa umsókn frá tær, áðrenn 20. juli kl. 14.00. Tit kunnu byrja í starvinum 9. august 2021 ella skjótast gjørligt. Umsóknir verða at senda til korndalsgardur@eidi.fo